# Fiskavirking tikið lykilin til laksavirkið frá Hera Hjelm

**– Fiskavirking metir støðuna soleiðis, at leigumálið um virkisbygningin í Vági er hildið uppat**

SUÐURLAKS
*Áki Bertholdsen*

Útlitini fyri at bjarga teimum 120 arbeiðsplássunum á stóra laksavirkinum í Vági verða verri og verri.

Fíggjarligu trupulleikarnir hjá virkinum eru nú so stórir, so tað skal nógv til fyri at at tað skal lata uppaftur.

Tað nýggjasta er, at nú hevur Heri Hjelm eisini mist lyklarnar til virkið.

Laksavirkið helt til í gamla, stóra flakavirkinum í Vági, Polarfrost, sum Heri Hjelm leigaði frá Fiskavirking til at hava laksavirkið í.

Og Meinhard Jacobsen, stjóri á Fiskavirking, váttar nú fyri Sosialinum, at teir hava biðið Hera Hjelm um lyklarnar til virkið.

Og tað hevur Fiskavirking fingið.

Meinhard Jacobsen sigur, at tá ið laksavirkið ikki hevur megnað at svara sínar leiguskyldir,

– Tá ið leigarin ikki megnar at gjalda leiguna, verða vit noyddir at taka lyklarnar.

Stjórin á Fiskavirking sigur, at sum støðan er nú, har leigarin ikki megnar at halda sínar skyldur, metir Fiskavirking støðuna soleiðis, at leigumálið er hildið uppat.

Hvat ið síðani hendir, veit hann ikki, men hann sigur, at nú vera aðrir møguleikar kannaðir.

Hvat tað skuldi verið, veit hann ikki enn.

Fiskavirking hevur júst fingið váttað frá Pan Fish, at teir verða ikki við í virkinum í Vági og Pan Fish er eisini farið at taka maskinur úr virkinum.

– Tað, at Pan Fish ikki longur vil vera við í virkinum í Vági, er so nýtt, at vit vita ikki, hvussu landið liggur enn og enn er ómøguligt at siga, hvussu leikur ferð.

– Vit mugu fyrst vita, hvussu leikur ferð og hvussu tað endar hjá Hera Hjelm. Tá ið tað er greitt, taka vit støðu útfrá tí.

Men hann ásannar eisini at støðan er ógvuliga trupul, tí tað skal umhugsast gjølliga, hvat skal gerast.

– Tað er nógv aling i Suðuroynni og tað mugu vit eisini hugsa um, sigur Meinhard Jacobsen.



*Laksavirkið í Vági er tað mest framkomna av sínum slagi sum til er. Men bara eitt ár eftir at tað læt upp, kom tað í so svárar trupulleikar, at tað er ógvuliga óvist um virkið letur upp aftur*

### Forfylgt av óeydnu

Tað var annars við bjørtum vónum, at Heri Hjelm læt Laksavirkið upp fyri jól í 2001. Virkið var stórt og framkomið, men hann hevði góðar vónir til, at tað fór at bera seg, hóast tað 70 milliónir.

Tað var norska felagið Pan Fish, sum átti tað mesta av virkinum.

Men virkið var ikki ígongd í meiri enn eitt ár, so stóð fast.

Og tað má av sonnum siga, at virksemið hevur verið forfylgt av óeydnu frá fyrsta degi. Heilar tríggjar ferðir hevur hann mist fisk í aliringum av óveðri, sum hevur slitið ringarnar og tilsamans mist næstan eina millión av fiski.

Harafturat fekk hann eisini ILA í eitt av brúkunum og aftur nú er ILA staðfest í einum brúki. Og omaná alt kom eisini eldur í einaferð.

– Samstundis fór Pan Fish mestsum á húsagang, men varð bjargað í evstu løtu.

Men so nógvur mótgangur upp á minni enn eitt ár, tók grundarlagið undan virkinum og beint fyri jól í fjør varð fólkið sagt upp.

Og sum støðan er í løtuni, skal nógv henda og fella upp á pláss, skal tað eydnast at endurreisa virkið.

# Vágs Býráð heldur seg til avtaluna við Fiskavirking

**Avtalan við Fiskavirking er, at arbeiðið skal vera á virkinum í Vági, sigur Borgarstjórin**

SUÐURLAKS
*Áki Bertholdsen*

– Heldur virksemið hjá Laksavirkinum hjá Hera Hjelm uppat, má fiskavirking finna eina ðara loysn. Tí arbeiði skal vera á virkinum í Vági.

Tað sigur Jógvan Krosslá, borgarstjóri í Vági. Hann hevði góðar vónir til Laksavirkið í Vági, og hann er ógvuliga keddur av, virkið er komið í so stórar trupulleikar, at tað veruliga stendur á at fáa tað uppaftur.

Men fyri arbeiðsfólkið er kanska ein glotti at hóma.



*– Heldur virksemið hjá Hera Hjelm uppat, má Fiskavirking finna uppá okkurt annað, tí tað er avtalan, at arbeiði skal vera á virkinum í Vági, sigur Jógvan Krosslá, borgarstjóri*

Jógvan Krosslá sigur nevniliga, at arbeiði skal vera á virkinum í Vági.

Býráðið í Vági hevur havt eina fasta støðu mótvegis Fiskavirking og tað endaði við, at býráðið samtykti, at varð arbeiðið ikki á virkinum, skuldi Fiskavirking eisini úr Vági, tí so skuldi leigisáttmálin um grundstykkið, sum virkið stendur á, sigast upp.

Men tað endaði so við, at Heri Hjelm leigaði virkið.

– Men vit hava eina avtalu við Fiskavirking um virkið í Vági og hon er, at arbeiðið skal vera á virkinum.

Tá var eisini ein avtala gjørd við Fiskavirking um at arbeiðið skal vera á virkinum.

Jógvan Krosslá sigur, at beint eftir at býráðið hevði samtykt at koyra Fiskavirking úr Vági, bleiv arbeiði ikki á virkinum, hevði býráðið fund við Fiskavirking.

Og á tí fundinum váttaði Fiskavirking avtaluna, at arbeiðið skal vera á virkinum.

Tá váttaði leiðslan í fiskavirking eisini, at heldur virksemið hjá Hera Hjelm uppat, ætlar Fiskavirking at finna eina aðra loysn, so at arbeiðið á virkinum verður varðveitt.

Men, hvat virksemið, talan kann vera um, veit hann ikki.



# Føroyingar hjálpa krígsofrum




*Eina krónu fyri hvønn íbúgva er málið hjá Reyða krossi, men fólk eru eisini vælkomin at hjálpa eitt sindur meira, tá tey keypa inn*

*Mynd: Jens K. Vang*

**Allir føroyingar fáa høvi at hjálpa teimum, sum líða neyð í krígnum í Irak. Reyði krossur skipar fyri innsavning og fer at senda øllum føroyingum bræv. Í løgtinginum verður eisini spurt, hvat almennu Føroyar kunnu gera fyri at hjálpa**

NEYÐHJÁLP
*Ingi Rasmussen*

Samvitskan fær eitt lítið prik, tá vit keypa inn í stórum.

Við kassarnar í handlum og á stovnum kring alt landið eru sjónligar bússur settar upp, og innkomni peningurin fer til at veita neyðstøddum hjálp.

Tað er Reyði krossur í Føroyum, sum hevur tikið stig til innsavningina, og gjørt er av, at allur peningurin fer til at hjálpa teimum, ið koma illa fyri av krígnum í Irak.

### Eina krónu hvør

Í næstu viku fer Reyði krossur rættiliga í hernað. Tá verða brøv send øllum føroyingum við eini áheitan um at hjálpa offrunum frá krígnum í Irak. Hetta er eitt hugskot, sum er roynt í Danmark við góðum úrsliti.

– Brævið er ein áheitan til allar føroyingar um at hjálpa. Vit senda eitt bræv til hvørt húskið, og vit rokna við, at føroyingar stuðla, tí tað plaga teir at gera. Tað er ein gomul viðtøka í Reyða krossi, at vit skulu royna at hjálpa við einari krónu fyri hvønn íbúgva, so okkara mál er fáa umleið 50.000 krónur, men skuldi meira komið inn, so fer tað eisini til fólkið í Irak, sigur Suni Vinther, formaður í Reyða krossi í Føroyum.

Tá sama tiltakið varð fráboðað í Danmark, kom nógvur peningur inn, longu áðrenn brævið varð sent. Og tað fekk BGBank at veita eina millión krónur til neyðhjálp í Irak.

### Krossur í serstøðu

Reyði krossur hevur ein einastandandi møguleika at hjálpa. Aðrir hjálparfelagsskapir eru blakaðir úr Irak, men Reyði krossur hevur fingið at vita, at hann er vælkomin.

– Vit halda tað vera neyðugt at hjálpa, har vit kunnu, og vit hava eisini møguleikan at hjálpa. Vit sleppa at hjálpa bæði innan- og uttanfyri Irak, og vit fáa loyvi frá báðum pørtum at fara tvørtur um linjurnar. Okkara merkið gevur atgongd, so vit hava góðan møguleika at bera skjótt at, sigur Suni Vinther.

### Hjálp úr løgtingi

Eisini okkara fólkavaldu sleppa at viðgera, um Føroyar eiga at taka lut í hjálparararbeiðnum. Hendrik Old, løgtingsmaður fyri Javnaðarflokkin, hevur sett løgmanni fyrispurning, sum skal svarast í løgtinginum.

Henrik Old spyr, um løgmaður kann taka stig til at kanna á hvønn hátt, føroyingar best kunnu hjálpa irakska fólkinum, nú kríggið leikar á.

– Vit vita øll, at í einum kríggi verða tað mong ósek menniskju, ið koma at líða, og mangan tykist tað sum, at long tíð gongur, til tann lovaða hjálpin kemur vegin fram. Tað síggja vit best eftir kríggið í Afghanistan, har mong menniskju mangla so at siga alt, ið hugsast kann, sigur Henrik Old.

Hann heldur, at Løgmansskrivsstovan við sínum samskifti bæði innan- og uttanlands hevur møguleika at finna og vísa á tann besta og skjótasta háttin, vit kunnu hjálpa irakska fólkinum.

# Føroyska krígsstøðan í Fólkatingið

**Lurtaði danska stjórnin eftir løgtingssamtyktini um Irak, áðrenn hon dróg Føroyar inn í kríggið? Tað spyr Tórbjørn Jacobsen í fyrispurningi til danska forsætisráðharran**

FYRISPURNINGUR
*Ingi Rasmussen*

Føroyska støðan til kríggið í Irak verður nú drigin inn í Fólkatingið.

Tað hendir, eftir at Tórbjørn Jacobsen, fólkatingsmaður, hevur sett Anders Fogh Rasmussen forsætisráðharra fimm spurningar. Hann verður spurdur, um hann kennir til samtyktina á Føroya løgtingi um, at øll tiltøk móti Irak eiga at verða góðkend av ST, og um hendan samtykt er viðgjørd í donsku stjórnini.

Tórbjørn Jacobsen spyr eisini, um danska stjórnin hevur umhugsað at lurta eftir Føroya løgtingi, áðrenn avgerðin um at draga Føroyar inn í kríggið varð tikin.

– Hóast løgtingssamtyktina hevur danska stjórnin vegna bæði Danmark og Føroyar gjørt av at fara í kríggj ímóti Irak saman við USA og Bretlandi. Stjórnin spurdi ikki føroyskar myndugleikar, áðrenn hon tók avgerðina. Og hon hevur heldur ikki síðan givið nakra fráboðan um, at Føroyar eru ímóti krígnum. Tvørturímóti verður føroyskt loftrúm beinleiðis inndrigið í kríggið, sigur Tórbjørn Jacobsen.

Hann ger vart við, at forsætisráðharrin hevur sagt í fólkatingssalinum, at Danmark og Føroyar eru javnsettir partar í ríkisfelagsskapinum, sum byggja á »gensidig respekt«.

– Eg havi ilt við at síggja javnsetingina í hesum sokallaða felagsskapi. Eg havi ilt við at síggja fólkaræðið. Og eg havi ilt við at síggja virðingina, sigur Tórbjørn Jacobsen og spyr forsætisráðharran, hvussu hann sær tað.

Annars vísti ein kanning í Sosialinum í gjár, at annar hvør føroyingur stuðlar krígnum ímóti Irak. Hinvegin tóku 57 prosent av teimum spurdu undir við samtyktini hjá Føroya løgtingi um, at øll tiltøk ímóti Irak skuldu góðkennast av ST.

## So reyk deyðarevsingin

**Deyðarevsingin í Føroyum fór endaliga í søguna í hesi vikuni, tá ríkisumboðið ímóti løgtingsins vilja lýsti nýggju donsku hernaðarligu revsilógina í kunngerðarblaðnum**

LÓGARSMÍÐ
*Ingi Rasmussen*

So fekst sjón fyri søgn. Ríkisumboðið hevur lýst ein bunka av hernaðarligum lógum, kunngerðum og fyriskipanum í kunngerðarblaðnum B, sum kom út í vikuni.

Við hesum er nýggja danska hernaðarliga revsilógin sett í gildi fyri Føroyar. Og harvið er tann gamla revsilógin frá 1937 ikki galdandi longur. Hon innihelt ásetingar um, at deyðarevsing er galdandi í krígstíð. Nú er hon avlívað.

26 lógir, kunngerðir og fyriskipanir um hervaldið í Føroyum eru lýst í nýggjasta kunngerðarblaðnum. Sostatt hevur danska stjórnin lýst lógir fyri Føroyar, beint ímóti einari samtykt í løgtinginum, tí løgtingið samtykti so seint sum í november 2001, at tað ynskti onga hernaðarliga revsilóg í Føroyum.

Tað eru ikki bara nýggjar lógir og kunngerðir, sum verða settar í gildi. Onkrar av lógunum stava heilt afturi frá amtsstíðini – eitt nú »Anordning nr. 513 af 02.10.1940 angaaende politimyndighed for søværnets skibe og luftfartøjer«.

Í einari fyriskipan frá 1961 á síðu 271 í kunngerðarblaðnum stendur eisini at lesa um hvussu landið skal verjast undir kríggi. Sagt verður, at »5. kolonnevirksomhed skal bekæmpes«, og at »Politiet vil på dette område bistå de militære myndigheder«.

Sambært Nudansk Ordbog verður meint við fólk, sum royna at undirgrava landsins stýri til fyrimun fyri eitt fremmant vald.

Sig so tað. Nú er at ansa sær.